# Trupult at arbeiða fisk eftir ferðaætlan

*Tað ber ikki til at leggja arbeiðið á einum virki í útjaðaraøki til rættis á sama hátt, sum gjørt verður, har landfast er. Tú mást vera ógvuliga fleksibul, sigur virkisleiðarin á flakavirkinum í Sørvági. Og ferðaætlanina hjá Strandferðsluni ber ikki til at brúka, tí hon broytist alt ov ofta*

EDVARD JOENSEN

Tað ber ikki til at leggja nakra framleiðslu til rættis eftir ferðaætlanini hjá Strandferðsluni, tí hon verður broytt alla tíðina, sigur Rói Egholm, virkisleiðari á flakavirkinum í Sørvági.

Hann gevur tó ikki stovninum skuldina fyri tað, men teimum, sum ikki játta neyðugu pengarnar til at røkja sambandið nøktandi.

»Vit mugu bara læra okkum at liva við, at við búgva í „Country og maybe“«, sigur Rói Egholm.

Vit sita inni á skrivstovuni hjá virkisleiðaranum. Uttan fyri liggur Vesturvarði og landar. Teir hava mest kongafisk og upsa. Truckarnir koyra aftur og fram. So hvørt sum slengið er sett á bryggjuna, tekur truckurin tað og fer inn á landingarmiðstøðina, har fiskurin verður skildur og vigaður. Síðani aftur ein túr yvir á flakavirkið, har eini 20-25 fólk skera hann til flak og pakka, so klárt er at avskipa.

Sørvágur er útjaðaraøki, og tað merkist væl hjá tí, sum skal reka eina fyritøku í bygdini, sigur virkisleiðarin.

Rói Egholm nevnir sum dømi, at dagin fyri, at Sosialurin vitjaði virkið, høvdu tey keypt kongafisk á uppboðssølu aðrastaðni í landinum. Strandferðslan flytir fiskin fyri flakavirkið, og tað plagar at ganga væl, sigur hann. Men hendan dagin var eitthvørt, sum kiksaði, og fimm kør stóðu eftir. Tað tók fleiri tímar at fáa tey vestur, millum annað orsakað av bíðirøð við ferjuleguna í Vestmanna. Og slíkt dýrkar vøruna, sigur Rói Egholm.



Eini 20-25 fólk arbeiða á flakavirkinum í Sørvági ( Mynd: Edvard Joensen)



*Rói Egholm, virkisleiðari á flakavirkinum í Sørvági, sigur, at tað er sera trupult at leggja nakra vinnu til rættis, tá flutningsmøguleikarnir ikki eru 100% nøktandi. Og tað eru teir ikki í Vágum, sum er*

Eitt annað er so, at lidna vøran eisini skal avstað aftur, sigur Rói Egholm. Og eisini her er munur á hjá teimum, sum liggja inni á meginlandinum, og hjá útjaðaravirkjunum.

Farmaskipini sigla eftir síni ferðaætlan, og tey sigla úr Havn. Hetta ger, at tey virkini, sum ikki hava landfast samband við Havnina, noyðast at gevast at arbeiða fleiri tímar, áðrenn tey, sum bara kunnu senda vøruna við einum bili, tá tíð er. Soleiðis fáa hesi virkini ein stóran fyrimun fram um tey, sum skulu um sund, sigur Rói Egholm.

### Samstarv

Sølufelagið Farex í Havn og reiðaríið hjá Vesturvarða í Sørvági eiga partapeningin í nýggja flakavirkinum í Sørvági. Virkisleiðari er Rói Egholm, sum er ein av eigarunum av Farex.

At reiðariðið hjá Vesturvarða er partaeigari í flakavirkinum merkir tó ikki, at Vesturvarði er bundin at virkinum í Sørvági. Hann skal í fyrsta lagi selja ein ávísan part av veiðuni um uppboðssøluna, og so er tað sjálvandi eisini natúrligt, at hann selur har, sum mest fæst afturfyri.

Virkisbygningurin, vit sita í, verður leigaður frá Vesturvón, meðan partaeigararnir eiga maskinurnar, sum standa inni á virkinum, sigur Rói Egholm.

Ein grund til, at júst hesir báðir partarnir hava tikið seg saman um flakavirkið er, at her er sakkunnleiki av hvør sínum slagi lagdur saman. Teir, sum veiða fiskin, duga eisini at hagreiða hann, so tað verður góð vøra, sum arbeidd verður. Og teir, sum keypa hann frá veiðimanninum, hava sambandið úteftir, og duga at selja vøruna til brúkaran úti í heimi.

Tey hava valt, sigur Rói Egholm at halda seg til tað, tey duga frammandunan. At arbeiða flak og saltfisk.

Tað er soleiðis, at tey flestu arbeiðsfólkini á virkinum hava royndir úr flakavinnuni, sum fyrr hevur verið í Sørvági. Tað seinasta var virkið hjá West Fish. Og Farex hevur góðar kontaktir á saltfiskamarknaðinum.

Rói Egholm sigur, at møguleikarnir at selja fisk eru rættiliga nógv betri í dag, enn teir vóru fyrr. Ein stórur trupulleiki fyrr var, at fólk dugdu ikki nóg væl mál. Her eru stór framstig hend, sigur hann. Og so er tað Internetið. Nú er at kalla eingin avmarking fyri, hvar til ber at hitta fólk. Væl at merkja meðan tú situr í egnari stovu.

Eitt annað, sum fyrr var sera umráðandi, tá ein skuldi selja fisk, var at ein átti pengar. Í dag eru fíggingarmøguleikarnir so góðir, sigur Rói Egholm, at tað er eingin trupulleiki at koma í gongd, um tú bara hevur ætlanir, sum eru so mikið skilagóðar, at fíggjarstovnarnir trúgva upp á tær.

### Áhugaverd ætlan

Telefonin ringir, og vit steðga samrøðuni. Okkurt handilssamband. Eitt føroyskt flakavirki, sum vil samstarva, skilst.

Kaffi og rundstykkir verða sett á borðið, og vit fáa okkum, áðrenn vit byrja aftur at práta.

Tey arbeiða við eini ætlan um at flyta framleiðsluna loftvegis av landinum, sigur Rói Egholm. Tann ætlanin er komin nakað áleiðis, og verður hon veruleiki, liggja møguleikar í hesum, er hann ivaleysur í.

Tað fer at bera til at avskipa eini trý tons dagliga við tí flogkapasiteti, sum er í dag, so hann metir tað ikki neyðugt at fáa sær egið farmaflogfar, sigur Rói Egholm. Men hann metir tó, at eitt sindur av almennum stuðli verður neyðugur fyri at koma í gongd.

Rói Egholm sigur seg hava varhugan av, at tað er politiskur vilji at stuðla slíkum tiltøkum, um tey tykjast skilagóð. Og tað heldur hann sjálvur hesa ætlanina vera, tí hon er rættiliga avmarkað, sigur hann. Tað, sum teir vóna at fáa av stuðli, skal bara brúkast til hjálp til at fáa støðiðundir verkætlanina í lagi.

Aftur ringir telefonin, so til ber at skonkja upp í aftur kaffikoppin, meðan virkisleiðarin tosar um prísir og fyrireikar keyp á telefonsøluni seinni hendan fyrrapartin.

Prátið fellur aftur á teir trupulleikarnar, sum standast av at arbeiða á einum útjaðaraøki.

Rói Egholm sigur, at tað ber illa til á einum útjaðaraplássi í Føroyum at brúka tann kunnleika, ein hevur verið uttanlands og nomið.

Eitt av høvuðsmálinum í øllum virkisrakstri er tilrættalegging. Men tað ber altso ikki til, tá ein skal laga seg eftir eini sera skiftandi ferðaætlan, sigur hann. Her verður ein noyddur at brúka gamla, føroyska tillaging. Gongur tað ikki í dag, so koma vit í morgin. Ella soleiðis næstan har á leið.

Hetta er bæði ein veikleiki, men sanniliga eisini ein styrki, sum føroyingurin hevur, sigur Rói Egholm.

Men sum flestu vágafólk uggar hann seg við, at nú verður tað ikki so leingi, til undirsjóvartunnilin kemur. Tá verður alt betri.



# Landbúnaðurin skal hava rúm, ræsur og frið at virka

*Festari, sum røkir sínar skyldur og í verki vísir dugnaskap, fær møguleika til - í størri mun enn higartil - at økja um vinnuligu nýtsluna av festinum. Hinvegin fær tað avleiðingar fyri framíhjárætt festarans, tá misrøkt og skyldur mótvegis Jarðargrunninum ikki verða hildnar, sigur landbúnaðarmálaráðharrin í tilmælinum*

ÓLAVUR Í BEITI

Í tilmælinum til framtíðar landbúnaðin undir heitinum »Vinnuliga nýtslan«, sigur Finnbogi Arge, at tjak hevur verið um, hvørt tað er rætt, at landið er so stórur jarðareigari, ella um landsjørðin átti at verið á privatum hondum. Eisini hevur verið ført fram, at um jørðin varð privatiserað, hevði hon verðið umsitin betri.

– Summi halda, at rætturin í galdandi lóggávu til at »arva« landsjørð í ávísum førum forðar fyri, at jørðin fer til teirra, sum høvdu fingið mest burtur úr henni. Landsjørðin er stórt sæð afturlatin fyri øllum uttan teimum gott og væl fýrahundrað fólkunum, sum nú einaferð sita við jørðini.

– Uttan mun til hvørja støðu tey ymisku hava til landsjørðina, ella um mett verður, at tað at umsita landsjørð er ein framíhjárættur ella ikki, so er torført hjá festara at sammeta seg við onnur vinnurekandi, tí teir eiga ikki framleiðslutólini og eru soleiðis eisini í eini aðrari støðu viðvíkjandi skattligum avskrivingum o. ø., enn vanlig vinnurekandi eru, vísur Finnbogi Arge á.

### Sámiliga inntøku

Og víðari sigur landbúnaðarmálaráðharrin, at í vinnuligum høpi er tað greitt, at gagnnýtsla og røkt av jørðini í Føroyum ikki kann hugsast, uttan so, at avkastið av jarðarbrúkinum er so mikið stórt, at tey fólk, ið velja sær hesa vinnu, fáa eina sámiliga inntøku burturúr. Landbúnaðarframleiðsla í Føroyum byggir á tað, sum kann vaksa í Føroyum. Framleiðslugrundarlagið er við øðrum orðum føroyska lendið og veðurlagið.

– Givið er, at umstøðurnar fyri størst møguligari virðisøking verða skaptar, tá jørðin verður umsitin, so hon búskaparliga kastar sum mest av sær. Hetta merkir ikki, at festarar, hvør í sínum lagi, miðvíst og fyri ein og hvønn prís skulu økja framleiðsluna. Áseyðatalið og reguleringar í hagalógini seta sínar natúrligu avmarkingar fyri ovurframleiðslu. Alt eftir støðd, høgleika og alternativum vinnumøguleikum, sum t.d. vistfrøðiligari framleiðslu o.a., verður tað upp til tann einstaka (í samráð við Jarðarráðið) at leggja langtíðarætlanir fyri festið, sigur Finnbogi Arge.

### Avleiðingar

– Íløgur í fjós, neyt o.a. verða ikki størri, enn framleiðslan og marknaðurin kunnu bera. Íløgur skulu ikki gerast við rakstrarstudningi sum grundarlag, tí úrslitið verður størri framleiðsla, enn marknaðurin vil keypa. Serligur dentur verður lagdur á at fylgja ásetingunum í galdandi lóggávu.

– Har tað verður staðfest, at festari ikki heldur skyldur sínar viðvíkjandi gagnnýtslu og røkt av jørðini, kríatúrum, bygningum, lánunum úr Jarðargrunninum, skal Jarðarráðið taka støðu festarans til viðgerðar og áleggja festaranum at fáa viðurskiftini í rættlag. Verður áheitanin ikki fylgd, fær tað avleiðingar fyri viðkomandi festara.

– Samanumtikið merkir hetta, at festari, sum røkir sínar skyldur og í verki vísir dugnaskap, fær møguleika til - í størri mun enn higartil - at økja um vinnuligu nýtsluna av festinum. Hinvegin fær tað avleiðingar fyri framíhjárætt festarans, tá misrøkt og skyldur mótvegis Jarðargrunninum ikki verða hildnar.



Og at enda sigur Finnbogi Arge í tilmælinum, at vinnuligu karmarnir eiga at verða støðugt raðfestir, soleiðis at vinnan fær rúm, ræsur og frið at virka eftir greiðum og nærri ásettum treytum. Við støði í galdandi lóggávu fer Vinnumálastýrið at miða ímóti at byggja eina fyrisiting upp, sum er væl samskipað og gera greiðar og vællýstar manngongdir, so fyrisitingin kann virka á høgum tænastu- og vitanarstigi.

# Lutfalsliga nýggjur trupulleiki í Føroyum

*Í Føroyum er eingin lóggáva, sum áleggur nøkrum myndugleika ábyrgdina av fólki, ið ikki hevur møguleikar at fáa sær bústað tilvega. Í Danmark er henda skylda áløgd kommununum*

ÓLAVUR Í BEITI

Heðin Mortensen spurdi almanna- og heilsumálaráðharran um bústaðarviðurskifti hjá sosialt veikum borgarum, og vildi Heðin Mortensen hava at vita, um landsstýrismaðurin hevur nakrar ætlanir um at bøta um bústaðarmøguleikarnar hjá teimum sosialt veikastu borgarunum?

### Heimarøktin

Í svarinum til spurningin, sigur Helena Dam á Neystabø, at sum støðan er í dag, er tað Almannastovan, sum eftir førimuni finnur loysnir fyri teir borgarar, sum ongan bústað hava. Men Almannastovna hevur hvørki neyðugar heimildir ella møguleikar at skipa fyri varandi loysnum ella at seta skipanir í verk, sum bøta um trupulleikan í síni heild.

– Almanna- og Heilsumálastýrið hevur tikið spurningin í álvara, og er m. a. í samstarvi við heimarøktina farið undir at kanna, á hvønn hátt vit fremja tær bestu loysnirnar. Neyðugt verður eisini at fáa staðfest, møguliga við lóggávu, um tað er landið ella kommunurnar, sum hava ábyrgdina av at útvega neyðugar búmøguleikar til hesar borgarar. Ætlanin er at arbeiða fram ímóti at fáa svarað hesum spurningi á bestan hátt til komandi ár.

### Hjá kommununum

Viðvíkjandi spurninginum, um landsstýrismaðurin kann vísandi til lóggávu siga, hvør hevur skyldu til og ábyrgd av, at eisini hesum borgarum verður tryggjað mannsømilig kor, sigur Helena Dam á Nesytabø, at í Føroyum er eingin lóggáva, sum áleggur nøkrum myndugleika ábyrgdina av fólki, ið ikki hevur møguleikar at fáa sær bústað tilvega. Í Danmark er henda skylda áløgd kommununum.

– At eingin lóggáva er í Føroyum kemst av, at hetta er ein lutfalsliga nýggjur trupulleiki. Áðrenn ein lóggáva staðfestir, hvør hevur ábyrgdina av teimum heimleysu, mugu vit í felag, land og kommuna, koma ásamt um, hvør tað er, sum hevur ábyrgdina. Í hesum sambandi eru stig tikin til at bjóða kommununum, m.a. Tórshavnar Kommunu til fundar um hetta mál.

– Sjálv meti eg, at hetta er ein uppgáva, sum hóskar væl at liggja hjá kommununum, sum jú hava ábyrgdina fyri øllum kringumstøðum í sambandi við bústaðarviðurskifti í kommununi, sigur Helena Dam á Neystabø.

### Frelsunarherurin

Og um almanna- og heilsumálaráðharrin heldur tað vera rímiligt, at ein privatur felagsskapur sum t.d. Frelsunarherurin átekur sær hesa samfelagsligu uppgávu, uttan at fíggjarliga grundarlagið er tryggjað við lóggávu, svarar Helena Dam á Neystabø, at hon heldur tað arbeiðið, sum Frelsunarherurin í Havn ger, vera eitt sera týdningarmikið sosialt arbeiði. Tað er eisini tí, at landsstýrismaðurin á hvørjum ári roynir á fíggjarlógini at fáa tilvega nóg mikið av peningi til at stuðla Frelsunarherinum í hesum arbeiði.

– Landsstýrismaðurin er tó ikki av teirri fatan, at arbeiðið hjá Frelsunarherinum skal tryggjast við lóg. Fæst undirtøka fyri, at tað arbeiðið, sum Freslunarherurin ger, skal víðkast sum ein partur av heildarloysnini viðvíkjandi teimum heimleysu, so ætlar landsstýrismaðurin at arbeiða fram ímóti, at Frelsunarherurin fær meira pening til endamálið tey komandi árini, sigur almanna- og heilsumálaráðharrin at end á svarinum.


-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL — Sýnaður 04-98
Skrás.: 02-04-98
Km.: 24.000
Prísur: 218.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 G/B — Sýnaður 09-99
Skrás.: 09-09-91
Km.: 35.000
Prísur: 67.600,-

TOYOTA CARINA 2,0 GLI
Skrás.: 05-02-98
Km.: 19.000
Prísur: 154.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,6 GSI SEDAN — Sýnaður 01-99
Skrás.: 22-10-91
Km.: 171.000
Prísur: 58.600,-

TOYOTA CARINA 1,8 GLI
Skrás.: 05-09-96
Km.: 32.000
Prísur: 124.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 13-06-95
Km.: 82.000
Prísur: 87.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 GLI
Skrás.: 10-04-97
Km.: 41.000
Prísur: 145.600,- Garanti*

TOYOTA STARLET 1,3 XLI, 3 HURÐAR
Skrás.: 30-09-97
Km.: 29.000
Prísur: 86.600,- Garanti**

TOYOTA CARINA 1,8 GLI
Skrás.: 10-11-95
Km.: 90.000
Prísur: 120.600,- Garanti*

HONDA CIVIC 1,5
Skrás.: 19-11-98
Km.: 17.000
Prísur: 127.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 1,8 GLI — Sýnaður 12-99
Skrás.: 28-06-95
Km.: 70.000
Prísur: 119.600,- Garanti*

FORD ESCORT 1,8 D STW
Skrás.: 26-09-95
Km.: 64.000
Prísur: 97.000,- Garanti*

TOYOTA CARINA 1,6 — Sýnaður 10-97
Skrás.: 10-05-95
Km.: 89.000
Prísur: 98.600,- Garanti*

FORD KA
Skrás.: 23-05-97
Km.: 33.000
Prísur: 78.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 1,6 SEDAN
Skrás.: 04-06-93
Km.: 112.000
Prísur: 83.600,- Garanti*

FIAT PUNTO 60 S — Sýnaður 01-97
Skrás.: 30-01-97
Km.: 42.000
Prísur: 68.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B
Skrás.: 25-01-99
Km.: 21.000
Prísur: 136.600,- Garanti**

MITSUBISHI GALANT — Sýnaður 02-00
Skrás.: 12-06-91
Km.: 205.000
Prísur: 62.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA
Skrás.: 16-03-98
Km.: 50.000
Prísur: 122.600,- Garanti**

VOLVO 460 SEDAN — Sýnaður 06-99
Skrás.: 25-05-90
Km.: 88.000
Prísur: 65.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 XLI H/B — Sýnaður 02-00
Skrás.: 23-08-95
Km.: 80.000
Prísur: 93.600,- Garanti*

NISSAN MICRA — Sýnaður 02-00
Skrás.: 04-10-90
Km.: 39.000
Prísur: 19.600,-

VØRUVOGNAR

TOYOTA LANDCRUISER HJ61
Skrás.: 31-10-89
Km.: 137.000
Prísur: 120.600,- Garanti*

TOYOTA PREVIA 2400 GLI — Sýnaður 03-98
Skrás.: 27-12-94
Km.: 58.000
Prísur: 98.600,- Garanti*

TOYOTA HIACE 4x4 — Sýnaður 07-98
Skrás.: 19-10-87
Km.: 165.000
Prísur: 49.600,-

AVHEINTINGARTILBOÐ

HONDA ACCORD — Sýnaður 06-99
Skrás.: 15-08-86
Km.: 214.000
Prísur: 7.600,-

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820